# VAKSTRARHÚS

*Les tekstin og svara spurningunum niðanfyri.*

## VAKSTRARHÚSÁRINIÐ: VERULEIKI ELLA UPPSPUNI

Livandi verum tørvar orku fyri at yvirliva. Orkan, sum uppiheldur lívinum á jørðini, stavar frá sólini, sum strálar orku út í rúmdina, tí hon er so heit. Jørðin fær ein evarska lítlan part av hesi orku.

Jarðaratmosferan er eins og eitt verjandi teppi, ið liggur rundan um jarðaryvirflatan og forðar teimum hitabroytingum, ið høvdu verið á klótu við ongari atmosferu.

Meginparturin av orkuni, ið stavar frá sólini, fer ígjøgnum atmosferuna hjá jørðini. Jørðin upptekur ein part av orkuni, meðan hin parturin verður kastaður útaftur frá yvirflatanum hjá jørðini. Nakað av hesi afturkastaðu orku frá jørðini verður upptikin í atmosferuna.

Úrslitið av hesum er, at miðalhitin á jarðaryvirflatanum er hægri, enn hann hevði verið, um eingin atmosfera var. Atmosferan hjá jørðini hevur somu ávirkan sum eitt vakstrarhús, harfrá orðingin *vakstrarhúsárin* stavar.

Vakstrarhúsárinið sigst at vera vaksið í 20 øld.

Tað er ein sannroynd, at miðalhitin í atmosferuni hjá jørðini er hækkaður. Í dagbløðum og tíðarritum verður ofta hildið uppá, at økta koldioksid-útlátið er høvuðsorsøkin til hita-hækkanina í 20 øld.

Skúlanæmingur, sum eitur Andre, fær áhuga fyri, at tað møguliga er samband millum miðalhitan í jarðaratmosferuni og koldioksidið í útlátinum á jørðini.

Á einum bókasavni finnur hann hesar báðar ritmyndirnar.







Við støði í hesum báðum ritmyndunum kemur André til tað úrslit, at tað er greitt, at hækkaði miðalhitin í atmosferuni hjá jørðini kemur av hækkaða koldioksidútlátinum.

## Spurningur 1: VAKSTRARHÚS

***S114Q03 – 01 02 11 12 99***

Hvat er tað við ritmyndunum, sum styðjar niðurstøðuna hjá André?

..........................................................................................................................

..........................................................................................................................

## 1. :

## VAKSTRARHÚS

***S114Q04 – 0 1 2 9***

Jeanne, ein annar skúlanæmingur, er ósamd við niðurstøðuni hjá André. Hon samanber tær báðar ritmyndirnar og sigur, at nakrir partar av ritmyndunum styðja ikki hansara niðurstøðu.

Gev eitt dømi um, at ein partur av ritmyndunum styðjar ikki niðurstøðuna hjá André. Greið frá tínum svari.

..........................................................................................................................

..........................................................................................................................

..........................................................................................................................

## 2. :

## VAKSTRARHÚS

***S114Q05 – 01 02 03 11 12 99***

André stendur fast við sína niðurstøðu, at miðalhitin í jarðaratmosferuni hækkar, av tí at koldioksidútlátið økist. Men Jeanne heldur, at hann er ov skjótur við síni niðurstøðu. Hon sigur: "Áðrenn tú kanst góðtaka hesa niðurstøðuna, mást tú vera vísur í, at aðrar orsakir, ið kunnu ávirka vakstrarhúsárinið, eru støðugar.

Nevn eina av orsøkunum, ið Jeanne hugsar um.

..........................................................................................................................

..........................................................................................................................